


www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 05 - 2013

# Norska Petoro møguliga eisini kannast

Almenna norska oljufelagið Petoro, sum umsitur Statens Direkte Økonomiske Interesse (SDØE) og harvið ein triðing av loyvunum á norska landgrunninum, kann koma undir sjóneykuna í málinum um kappingaravlaging, sum EFTA hevur sett í gongd. Tað skriva norskir miðlar. Tað er tó Statoil, sum stendur fyri søluni av olju og gassi hjá statinum saman við egnari framleiðslu. Spurningurin er, hvørvítt Statoil selur gassið og oljuna hjá Petoro fyri egna rokning ella um tað bara stendur fyri søluni, sigur Erling Hjelmeng, professari við Lærda Háskúlan í Oslo við Finansavisen. Um so er at umsetningurin er partur av roknskapinum hjá Statoil, kann hann verða roknaður uppí eina møguliga milliardabót, um sáttmálabrot kunnu prógvast, heldur Hjelmeng. Kunningarstjórin hjá Statoil Jannik Lindbæk váttar fyri blaðnum, at olja og gass frá Petoro verður selt av Statoil. Nevndarformaðurin í Petoro, fyrrv. oljustjóri í fíggjarmálaráðharri, Gunnar Berge, ynskir ikki at gera viðmerkingar til upplýsingarnar skrivar blaðið. Tað var seinastu týsdag, at eftirlitsstovnurin hjá EFTA, ESA óvæntað vitjaði skrivstovur hjá BP, Shell og Statoil fyri at fáa hendur á skjølum. Hetta verður gjørt, tí illgruni er um, at feløgini kunnu hava brotið avtalur um prísáseting og kappingaravlaging.